# Almannamálaráðið

**Løgtingið**

Dagfesting: 30. oktober 2018
Mál nr.: 18/00875
Málsviðgjørt: HP

**Løgtingsmál nr. 58/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í lov for Færøerne om offentlig forsorg (Forsorgarlógin)** (Eftirlønargjald sambært Eftirlønarlógini leggjast aftrat forsorgarveiting)

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í lov for Færøerne om offentlig forsorg (Forsorgarlógin)**
(Eftirlønargjald sambært Eftirlønarlógini leggjast aftrat forsorgarveiting)

**§ 1**

Í lov nr. 56 af 15. marts 1967 for Færøerne om offentlig forsorg, sbr. lovbekendtgørelse nr. 100 frá 2. marts 1988 om offentlig forsorg (Forsorgarlógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 53 frá 4. mai 2017, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 9 verður aftan á stk. 2 sum nýtt stk. sett:
"*Stk. 3.* Bundna eftirlønargjaldið sbrt. løgtingslóg um eftirløn verður lagt aftrat upphædd sbrt. stk. 2."
Stk. 3-7 verða eftir hetta stk. 4-8.

**2.** Í § 9, stk. 4, sum verður stk. 5, § 32 c, stk. 2 og tvær staðni í § 32 d, stk. 1, verður "Almannastovan" broytt til: "Almannaverkið".

**3.** Í § 9, stk. 6, sum verður stk. 7, verða "stk. 4 og 5" broytt til: "stk. 5 og 6".

**4.** Í § 13 verður aftan á stk. 1 sum nýtt stk. sett:
"*Stk. 2.* Bundna eftirlønargjaldið sbrt. løgtingslóg um eftirløn verður lagt aftrat upphædd sbrt. stk. 1."
Stk. 2-4 verða eftir hetta stk. 3-5.

**5.** Í § 15, stk. 1 verður "3" broytt til: "4".

**6.** Í § 15 a, stk. 1 verður "2-7" broytt til: "2-8".

**7.** Í § 17, stk. 3 verður 3. pkt. orðað soleiðis:
"Endurgjaldið er í mesta lagi 25.000 kr. um mánaðin, íroknað frítíðarløn, umframt bundna eftirlønargjaldið sbrt. løgtingslóg um eftirløn."

**8.** Í § 33, stk. 2 verður "stk. 1 og 2" broytt til: "stk. 1 og 3".

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2019.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Sum partur av pensjónsnýskipanini fara persónar, sum fáa uppihaldsveitingar og endurgjald fyri inntøkumiss sambært forsorgarlógini, frá 1. januar 2019 eisini at spara upp sbrt. løgtingslóg um eftirløn. Í semjuni um pensjónsnýskipanina varð eisini staðfest, at eftirlønargjaldið verður lagt aftrat veitingunum. Í eftirlønarlógini eru útgjøld sambært forsorgarlógini strikað sum undantak, men neyðugt verður eisini at broyta forsorgarlógina.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Veitingar sbrt. forsorgarlógini eru undantiknar í eftirlønarlógini – t.v.s. eftirlønarlógin fevnir ikki um útgjøld sbrt. forsorgarlógini. Men við løgtingslóg nr. 69 frá 30. apríl 2018 er hetta broytt, og frá 1. januar 2019 fevnir eftirlønarlógin eisini um útgjøld sbrt. forsorgarlógini.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at fáa samsvar millum eftirlønarlógina og forsorgarlógina

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Frá 1. januar 2019 verður eftirløn sbrt. eftirlønarlógini eisini veitt av forsorgarveitingum. Talan verður um uppihaldsveitingar sbrt. § 9 og 13 og endurgjald fyri inntøkumiss sbrt. § 17 í forsorgarlógini, sum frameftir verða fevndar av eftirlønarlógini. Eftirlønargjaldið er 5 prosent í 2019 og hækkar við einum prosentstigi um árið, upp í 12 prosent í 2026.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið hevur verið til ummælis hjá Almannaverkinum, sum hevði einstakar málsligar viðmerkingar, sum eru tiknar til eftirtektar.

Talan er um konsekvensbroyting av løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirløn (løgtingslóg nr. 69 frá 30. apríl 2018), og harumframt er broytingin til fyrimuns fyri borgaran, tí bundna eftirlønargjaldið verður lagt aftrat veitingunum. Tí hevur uppskotið ikki verið til ummælis hjá øðrum pørtum.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

At eftirlønargjald á 5 prosent verður veitt av uppihaldsveitingum og endurgjald fyri inntøkumiss í 2019 hevur við sær, at útreiðslur landskassans økjast við uml. 3,6 mió. kr. Útreiðslurnar økjast á hvørjum ári fram til 2026, tá eftirlønargjaldið er komið upp á 12 prosent.

Kommunurnar fáa skattainntøkur av pensjónsgjøldum. At eftirlønargjald verður lagt aftrat uppihaldsveitingum og endurgjaldi fyri inntøkumiss merkir sostatt, at inntøkurnar hjá kommununum økjast við góðari mió. kr. í 2019 og økjast árini fram til 2026 samsvarandi hækkingini í inngjøldunum.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**

At fleiri veitingar verða eftirlønargevandi hevur við sær, at neyðugt er við tillagingum í KT-skipanini hjá Almannaverkinum, og hetta hevur við sær ein minni eykakostnað.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri vinnuna.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Lógaruppskotið hevur ikki fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri eitt ávíst øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Einum, sum av ymsum orsøkum eru burtur frá arbeiðsmarknaðinum í styttri ella longri tíð verður nú tryggjað eftirløn, soleiðis at tey ikki verða verri fyri, tá tey blíva fólkapensjónistar.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar í mun til millumtjóðasáttmálar á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar í mun til tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

**2.9. Marknaforðingar**
Lógaruppskotið hevur ikki við sær kendar marknaforðingar.

**2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella ger onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skatt ella avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki fólki skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?**
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

**2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum**

| | Fyri landið/ landsmynd ug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar /felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Ja | Nei |
| Umsitingarligar-avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar-avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | Ja | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina**

**Til § 1, nr. 1, 4 og 7**
Eftirlønargjald sbrt. løgtingslóg nr. 49 frá 14. mai 2013 um eftirløn (eftirlønarlógin) skal leggjast aftrat uppihaldsveitingum sbrt. §§ 9 og 13 og skal leggjast aftrat endurgjaldi fyri inntøkumiss sbrt. § 17 í forsorgarlógini. Almannaverkið skal flyta eftirlønargjaldið sambært ásetingunum í eftirlønarlógini.

Endurgjald fyri lønarmiss sambært § 17 kann í mesta lagi vera 25.000 kr. Harafturat kemur bundna eftirlønargjaldið. T.v.s., at endurgjaldið og eftirløn tilsamans kann vera hægri enn 25.000 kr. um mánaðin.

**Til § 1, nr. 2, 3, 5, 6 og 8**
Tøkniligar broytingar.

**Til § 2**
Lógin kemur í gildi 1. januar 2019.

Almannamálaráðið, 30. oktober 2018

**Eyðgunn Samuelsen**
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur